P/f Føroya Shell:

# Formel 1 koyring og Ferrari vitjan í Italia

**21. apríl fóru tríggir føroyingar til Formel 1 koyring í Imola í San Marino og vitjaðu Ferrari-býin Maranello í Italia. Túrurin var høvuðsvinningurin í kappingini, Shell Helix Grand Prix 2003**

FORMEL 1
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Erling í Liða*

Tað var í fjør, at Føroya Shell skipaði fyri kappingini, Shell Helix Grand Prix 2003.

Kappingin var fyri øll starvsfólk á føroysku bilasølunum og bilverkstøðunum kring landið. Líknandi kapping var eisini á donskum bilverkstøðum.

Kappingin var ókeypis, og starvsfólkini skuldu bert ringja til eitt ávíst telefonnummar og svara trimum ymiskum spurningum í sambandi við Formel 1 kappkoyringina í 2003.

Høvuðsvinningurin var ein ferð til Formel 1 í San Marino í Italia, sum er "heimabanin" hjá Ferrari, og at vitja á Ferrari verksmiðjuni í Maranello.

Vinnarin av ferðini til San Marino var Hans J. Kollsker, sum eigur og rekur Bilverkstaðið v. H.J. Kollsker, á Hjalla. Hann kom tó ikki sjálvur við til Italia.

Teir sum fóru hendan túrin vóru Kristian Holm Stórhamar, John Jensen, og Erling í Liða, sølu- og marknaðarleiðari frá Føroya Shell.

Teir fóru úr Føroyum 21. apríl til Danmarkar og síðan víðari við bussi til Maranello í Italia tann 22. apríl.

Vitjað varð í savninum Galleria Ferrari, testbanan hjá Ferrari, Fiorano, og á Ferrari Club Maranello.

Leygarkvøldið varð døgurði á Restaurant Montana í Maranello - har sum formel 1 koyrararnir Schumacher og Barrichello eisini eta, tá teir eru har í býnum.

Sunnudagin varð vitjað á Imola-bananum, har Formel 1 koyrarar royndu seg á rasarabananum.

Teir tríggir, Kristian, John og Erling, eru samdir um, at túrurin var ein stór uppliving, serliga at síggja Formel 1 koyringina og Ferrari bilverksmiðjuna. At vera á heimabana hjá Ferrari, og síggja Michael Schumacher vinna har, var sera stuttligt.

Formel 1 koyringin í 2003 gav góð úrslit hjá Ferrari og Shell, har Michael Schumacher bleiv heimsmeistari og Ferrari samstundis vann heimsmeistaraheitið fyri lið samanlagt. Til Formel 1 kappingar hevur Shell latið brennievni og smyrjiolju til Ferrari í mong ár, samstarvið byrjaði í 1950. Áliga hevur Ferrari brúk fyri, at Shell letur 300 oljuveitingar á 24 koyribreytum í 15 ymiskum londum.

Aftur í ár hevur Shell líknandi kapping "Shell Helix Grand Prix 2004" fyri bilasølur og verkstøð, og í løtuni liggur Ferrari við Michael Schumacher klárt á odda í kappingini við fullum stigatali.



*Føroyingarnir í ferðalagnum, f.v. Kristian Holm Stórhamar, Erling í Liða og John Jensen*



*Imola-banin í San Marino – ið er heimabanin hjá Ferrari*


*Ein rundkoyring á bananum við teimum kendu Formel 1 koyrarunum sum t.d. Schumacher, Barrichello og Montoya, áðrenn teir seta seg í bilarnar*



*Formel 1 bilar á Ferrari savninum Galleria Ferrari*



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**


**KIA CARNIVAL DIESEL**
Árg okt.2003, Km 27.000. Um hóskandi boð fæst selist hesin 7- persónabilur vegna keyp av minni bili.
**Tel. 260825**


**DAEWOO MATIZ**
Árg 1999, Km 41.700. El-síðurútar framman. Nýsýnaður. Sera væl hildin. Kr. 45.000.
**Tel. 226620**

**LÝSIÐ**
við

**brúktum bilum í Sosialinum**


**ROVER 827 COUPE DE LUXE AUTOMATIC**
Árg Apr-98, Km 28.000. Sera vælhildin Top modell: Bert koyrt 28.000 km Klimaanlegg- Leðurinntrekk- Sóltak- El-rútar- El-spegl- Fjarstýrt Centrallás- Radio- Alufelgur- Spoylarar v.m. Sertilboð Kr. 198.000.


**KIA SEPHIA II 1.5 SLX**
Árg Apr. 99, Km 71.000. El-rútar. fr.- Valnød Instrumentbrettið, Takboylar- Sleipikrók v.m. Kr. 86.000.


**ROVER 620 SI**
Árg Jun-99, Km 81.000. Aircondition- Alufelgur- Fjarstýrt centrallás- El-rútar- El-spegl v.hita. C.D.Anlegg- Sleipikrók v.m. Kr. 158.000.


**SUBARU LEGACY 2.0 GL AUTOMATIC**
Árg Sept. 1995, Km 96.000. Centrallás- El.rútar- El-spegl- Radio v.bandspælara v.m. eyka tectylviðgjørdur. Kr. 78.000.


**KIA CARNIVAL 2.9 HPDI EX MODEL**
Árg Mar-02, Km 195.000. Top modellið: Aircondition- Automatgear- Regnsensor- El-stýrt førarasetur- El-rútar fr.+ aftan- El-spegl- Fjarstýrt centrallás- Hita í forrúti- C.D. anlegg- Mjørkal.- Leður róður v.m. Kr. 220.000.


**FORD ESCORT STATIONCAR 1.8 TURBO DIESEL**
Árg Okt. 1997, Km 159.000. Elrútar. fr.- Valnød Instrumentbrettið, Takboylar- Sleipikrók v.m. Kr. 66.000.


**SUBARU LEGACY 2.0 GL AWD STATIONCAR. 4 HJÓLSTREKK**
Árg Mar-98, Km 63.000. Bakkisensor - 4 WD v.Reduktiónsgear - Fjarstýrt centrallás- El-rútar- El-spegl- C.D. Anlegg v.m. Kr. 128.000.

P/f. D. B. Bilar
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600 - Fax 310650**

**TAÐ ER NÚ, PENGAR KUNNU SPARAST!!!**

FOCUS C-MAX Van 1.8 i (120 HK og 125 HK)



Ambiente prísur v/mvg kr. 175.000,- uttan bil í býti
Trend prísur v/mvg kr. 182.000,- uttan bil í býti

FOCUS C-MAX Van 1.6 Tdci (110 HK)

Trend prísur v/mvg kr. 197.000,- uttan bil í býti

FUSION Van 1.4 Tdci




Trend prísur v/mvg kr. 136.000,- uttan bil í býti

**P/f Wenzel**

Akranesgøta 5 · 100 Tórshavn · tel. 354500 · fax 354501 · www.wenzel.fo · wenzel@post.olivant.fo